

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 01 - 2012

# Cosl Pioneer borar í Norðsjónum

Kinesiski boripallurin Cosl Pioneer, sum skal bora á føroyska landgrunninum fyrra hálvár í 2012, borar í løtuni fyri Statoil í Norðsjónum. Pallurin, sum kom til Noregs í fjør, hevur longu borað nakrar brunnar, og sum skilst, so riggar alt umborð, sum tað skal. Pallurin er júst farin út til eina nýggja uppgávu á framleiðsluloyvinum 053, har Statoil er fyristøðufelag. Hini feløgini í hesum loyvinum eru Petoro, Total, ExxonMobil og ConocoPhillips. Brunnurin, sum Cosl Pioneer skal bora fyri Statoil, ExxonMobil og Atlantic Petroleum er mettur at kosta eina milliard krónur og fer tað at taka einar 4-5 mánaðir at bora brunnin, sum hevur fingið heitið Brugdan 2. Hann verður boraður nærhendis Brugdan 1, sum varð borað í 2006. Nú verður so farið nógv djúpri. I fjør vóru umboð fyri fleiri føroyskar myndugleikar umborð á pallinum. Áðrenn pallurin setur kós móti Føroyum fara unboð fyri Jarðfeingi og aðrar myndugleikar at vitja pallin fyri at fáa tað seinasta uppá pláss, soleiðis at hann lýkur øll krøv til leiting á landgrunninum. Tá ein slíkur nýggjur pallur kemur inn á føroyskt øki, skal hann góðkennast av myndugleikunum. Ein partur av fyrireikingunum til komandi boringina fevnir so eisini um at gera avtalur við teir ymsu undirveitararnar. Teir størstu eru so útgerðarhavnin, flutningurin við tyrlu og flogfari, proviantering ol. Mynd Cosl Pioneer á boriuppgávu í Norðsjónum